# Tríggir prestvígdir lutheranarar



**Tríggir prestar okkara hava sama føðingardag, sum Martin Luther**

FØÐINGARDAGAR

10. november er ein serligur dagur. Ikki bara tí, at teir tríggir prestvígdu lutheranarnir, Erland Beder, prestur, Hans J. Joensen, bispur og Martin Restroff Jacobsen, prestur, hava føðingardag, men hendan dagin varð eisini Martin Luther.

…nýtið bussin!



Lít teg um, meðan Bygdaleiðir koyra teg vestur. Siggj Skælingskarð í Streymoy og ver løtu seinni bergtikin av Breiðastíggi vágamegin. Og unnir tú eisini umhvørvinum okkurt, er busstúrurin bara ein ókeypis og síðmennandi síðuvinningur, sum Bygdaleiðir bjóða.

Alt hetta fært tú, meðan strongdir bilførarar í tíðarneyð hvør í sínum lagi skifta gír og síðu, spíta upp og blinda niður, víska og venda sær og fløyta og froysa. Meðan tú bara ert burtur í onkrum.

Tí ert nevniliga vaknaður og vorðin varugur við, at tað at ferðast skal kennast sum ein frágd frá fyrstu frítøru. Og samstundis, sum tú fært frið at fara, verður tú borin millum bygda á stórum og tryggum hjólum. Eisini úr oyggj í oyggj undir sund.

Kostnaðurin er hin sami sum áður, hóast tænastan er vorðin nógv betri. Leiðin er munandi stytri, og frameftir fer nýtt starvsfólk at hjálpa ferðandi við viðførinum.

Hví baksast í bili? Nýtið bussin!

BYGDALEIÐIR

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

# Jólasangløta við Siloa-kórinum

SANGLØTA

Sunnukvøldið kl. 20.30 fer sangkórið í Siloa, sum júst hevur givið eina fløgu út, at hava eina sangløtu í Siloa. Og við tað at vit nú eru komin so tætt at jólum, fer kórið at syngja jólasangir hetta kvøldið. Har verður bæði nýtt og gamalt tilfar, og sungið verður bæði á føroyskum og enskum.

Kórið fer bæði at syngja uttan ljóðføri og saman við orkestri. Á ljóðførini spæla: Jóhannes Simonsen klaver, Bárður á Lakjuni bass og tvørfloytu, Arni Zachariassen guitar, Jóhan á Lakjuni trummur og Martin Simonsen urgu. Eins og áður stjórnar Eyðun á Lakjuni kórinum.

Eisini fer sangbólkurin "Salt", ið er mannaður við ungfólki úr Eysturoynni, at syngja nakrar sangir sunnukvøldið.

Sangkórið í Siloa bjóðar øllum at steðga á við jólastákinum eina løtu og koma til eina hugnaliga løtu í Siloa við góðum sangi og einum drekkamunni aftaná.

# Vunnu undir Sundinum

**Í samband við stóra renni- og gongutiltakið undir Vestmannasundi sunnudagin 8. december, var eisini burturlutting. Summir vinningar eru ikki heintaðir enn, sigur Sandavágs Ítróttarfelag**

VINNINGAR

Sandavágs Ítróttarfelag liggur enn inni við nøkrum av vinningunum, sum lutaðir vórðu burtur í stóra tunnilstiltakinum sunnudagin 8. december. Fólk, sum hava vunnið, kunnu venda sær til formanni í SÍF á tlf 33 38 43 og fáa at vita, hvar vinningarnir kunnu heintast.

Vinningarnir fullu soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Apex ferðaseðil frá Atlantic Airways | Manijeh Elsa Modi, Mýrusnípuvegur 8, Tórshavn |
| 2. | Karamellur | Gunnar Eysturoy, á Fløtti 3 Tórshavn |
| 3. | Karamellur | Joan Eilin Johansdóttir á Strondum |
| 4. | Karamellur | Tinna Petersen, Lynggøta 4 Tórshavn |
| 5. | Karamellur | Kára Petersen Vestmanna |
| 6. | Karamellur | Karin Eidesgaard Hansen Eiði |
| 7. | Vikuskifti á Hotel Vágum | Astrid Magnussen, Lítla Tvørgøta 1, Tórshavn |
| 8. | Karamellur | Napoleon Joensen, Marknagilsvegur 80, Tórshavn |
| 9. | Karamellur | Rúni Vesturklett, Mouritsargøta 14 Hoyvík |
| 10. | Karamellur | Lív Reginsdóttir Kvívík |
| 11. | Karamellur | Janny Gudmundsen Sandav. |
| 12. | Karamellur | Ella Joensen Kollafirði |
| 13. | Fartelefon frá Kalli | Birita Joensen, J. Paturssonargøta Tórshavn |
| 14. | Karamellur | Símun Joensen, Villingardalsvegur Tórshavn |
| 15. | Karamellur | Duruta Tóradóttir Klaksvík |
| 16. | Karamellur | Elinborg Miðberg, Grannatún Saltangará |
| 17. | Karamellur | Sigurð Torfinsson Sandavági |
| 18. | Karamellur | Anna Maria av Reyni, Undir Heygnum, Tórshavn |
| 19. | 5-túrakort Vágatunnilin | Jógvan Edvard Joensen, Slættalíð 12, Tórshavn |
| 20. | 5-túrakort Vágatunnilin | Hans Pauli Danielsen, J. Noløesgøta 25, Tórshavn |
| 21. | Vikuskifti á Hotel Vágum | Jensia av Steinum, Dalavegur 45 Tórshavn |

Fleiri vinnarar hava boðað frá og fingið sínar vinningar, men summir eru eftir enn. Hóast roynt hevur verið at fingið samband við vinnararnar , hevur tað ikki í øllum førum eydnast. Heitt verður tí á tey um at seta seg í samband við formannin í SÍF á tlf. 33 38 43

ej



Prestafeðgar undan jólum:

# –Vit eiga at minnast dupulta kærleiksboðið eisini á jólum



*Faðir og sonur og tvey ættarlið av prestum. Petur Martin og Ólavur Rasmussen í Havnar Kirkju 2. sunnudag í advent, tá fyrsta langabba- og abbadóttirin varð doypt*

**- Tað er ógvuliga týdningarmikið, at kristniboðskapurin stongir seg inn gjøgnum sjálvt teir tjúkkastu fongsulsmúrarnar, tí vónin er týdningarmikil. Tað er týdningarmikið at siga, at tað er ljós, sjálvt um heimurin er myrkur. Dupulta kærleiksboðið “ger móti næsta tínum soleiðis sum tú kundi hugsað tær, at hann gjørdi móti tær” er ein sera grundleggjandi boðskapur hjá Jesusi, eisini nú vit halda jól sigur Ólavur Rasmussen, sóknarprestur**

PRESTAPRÁT UNDAN JÓLUM

*Orð og myndir: Jan Müller*

2. sunnudagur í advent var ein serligur dagur fyri prestafeðgarnar, Petur Martin Rasmussen og Ólav Rasmussen. Henda dagin varð fyrsta langabbadóttir og abbadóttur teirra doypt í Havnar kirkju. Tað var so tann yngri av prestunum, sum hevði prædikuna henda sunnudagin og tí eisini dópin. Hon varð doypt Óluva Johanna Jørginsdóttir Enghamar, eitt navn, ið gongur aftur í báðar ættir og í bæði kyn langt aftur í tíðina.

Ólavur, sum í dag er prestur í Hvalba, legði sær leiðina til Havnar henda sunnudagin. - Beinta, dótturin, vildi, at eg skuldi doypa abbadóttrina. Danski presturin í Dómkirkjuni segði við meg, at tað var gamaní at fáa kirkjuna og at eg skuldi gleða meg til at sleppa at doypa abbadóttrina, tí tað upplivilsi at doypa síni abbabørn, hevði hann sjálvur havt, og tað var fantastiskt. Og tað var ein stór løta, stuttlig og rørandi leggur Ólavur aftrat.

Faðirin, Petur Martin, sum hevur eitt langt lív sum prestur aftan fyri seg, varð eisini í Dómkirkjuni henda minniliga dag, nú fyrsta langabbadótturin skuldi doypast.

Hetta høvið gav okkum møguleika at seta tveimum prestaættarliðnum stevnu at tosa um kristindóm, jól, eyðmýkt, frelsu, fordøming oma. Vit spurdu Petur Martin, ið herfyri fór frá sum prestur á Tvøroyri, hvussu tað kenst at lýða á prædiku hjá soninum, tá man sjálvur hevur lagt prestakragan!

- Tað er hugaligt, og eg havi ikki skomm av honum. Og so duga teir yngru prestarnir nakað, sum vit eldru prestar ikki duga - at fáa sagt tað meira viðkomandi til fólk. Teir hava arbeitt meira við tí. Vit kanska arbeiddu meira við teimum gomlu bíbilsku málunum.

## Hvat er ein góð prædika!

Petur Martin hevur verið prestur í 40 ár og heldur fyri, at teir eldru prestarnir hava lært nógv gjøgnum eitt langt lív. Ein høvuðskjarnin í prestayrkinum er væl prædikan. Men hvat er ein góð prædika:

Petur Martin: - Fólk skulu gjarna fara eitt sindur glaðari út úr kirkjuni, enn tá tey komu í kirkju, tí tey fáa at vita nakað, sum tey kunnu taka út við sær í gerandislívið. Nú er tað ikki undirvísing vit hava fyri, men tað er ein boðskapur, sum tey koma at bera við sær út aftur í lívið til og millum síni medmenniskju.

*- Er tað soleiðis, at fólk kanska skulu kenna seg frelst, tá tey fara út aftur úr eini kirkju, ella er tað meira tað at hava lært nakað ella fingið nakað at hugsas um?*

- Tað er ikki lærarafunktiónin og heldur ikki hitt. Eg skal ikki broyta nakað menniskja. Líkamikið, hvør tað er, sum kemur í kirkju, skulu tey fáa ein boðskap, og so mugu tey sjálvi um, hvat tey gera við hann, nær sagt. Men tey skulu gjarna fáa okkurt at hugsa um.

*- Tað eru tey, sum siga, at kirkjurnar eru vorðnar so óviðkomandi og prædikurnar so keðiligar, at fólk lata seg heldur draga av samkomum, har talararnir tosa um frelsu og fortapilsi.*

- Tað skal eg ikki leggja meg út í. Tað er so ikki mín stílur. Eg skal bera henda boðskapin, og eg kann ikki gera meira. So mugu Várharra og tey sjálv um restina.

*- Hvat er tá fyri teg tann týdningarmesti boðskapurin?*

- Nú fara vit at halda jól. Men eg haldi ikki, at vit í Vesturheiminum duga so væl at halda jólaprædikur. Tað eru nokk tey í eysturevropeisku kirkjunum, sum duga tað. Har hava jólini meira at siga. Jólaboðskapurin er, at Gud blívur menniskja sum eitt annað menniskja ímillum menniskju. Vit duga betri at halda páskaprædikur. Jólahaldið her hjá okkum er eitt sindur yvirgearað, og viðhvørt gongur tað ov nógv uppá tað hugnaliga. Tað er ikki altíð líka hugnaligt her í lívinum. Og tað skal eisini kastast ljós inn yvir skuggasíðurnar. Tey menniskju, sum liva á skuggasíðunum, skulu eisini hoyra henda boðskapin. Boðskapurin er eisini til teirra.

## Jól og páskir

*- Skuldi tú tikið samanum tað besta frá øllum tínum prædikum gjøgnum eitt langt lív sum prestur, hvussu vildi tann prædikan ljóðað?*

- Eg kundi hugsað mær at lisið Jólaevangeliið og Páskaevangeliið. Páskirnar eru grundhátíðin, og páskir fóru tey at halda beinanvegin aftaná alla Jesushendingina. Tað gingu 300 ár, áðrenn tey fóru at halda jól. Tað var ein serlig hending í kirkjusøguni, sum gjørdi, at Jesus bleiv avskrivaður sum eitt spøkilsi, sum ikki hevði nakað samband við hesa jørð. Og so fóru teir at leita eftir føðingardegnum, sum teir ongantíð funnu. Men so valdu teir hesa gomlu heidnu jólahátíðina, sum varð hildin, tá sólin kom uppaftur á himmalin. Eg haldi, at tað er eitt frálíkt val, so tað er ikki av ongum, at vit tendra nógv ljós á jólum, og vit hátíðarhalda jólini.

*- Hvat metir tú so at vera kjarnan ella boðskapin í Jóla- og Páskaevangeliunum?*

- Hann er tann sami, tá samanumkemur. Hann er lív og deyði. Og tað er jú okkara egna lív. Eg eri so oftani freistaður at endurgeva Grundtvig. Ein týskur heimsspekingur vitjaði hann og tosaði um mótsetningarnar her í verðini, og Grundtvig segði, at hann hevði bara eitt sett av mótsetningum, og tað er lív og deyði. Vit liva hetta lívið men við deyðanum fyri eygað. So hevur onkur sagt, at skulu vit doyggja eisini, so er ikki vert at liva, og tað er sikkurt rætt eisini.

Hvat heldur Petur Martin so um kirkjuna og kristindómin, sum tey virka her á landi í dag - hava vit ein sunnan og góðan kristindóm?

- Nú havi eg verið prestur so leingi, at eg havi upplivað fólk undir møguligum og ómøguligum umstøðum. Tú møtir fólki við ymiskum fortreytum. Summum fólkum væntar man nakað av og øðrum væntar man sær einki av. Men har havi eg mangan verið positivt bilsin av menniskjum, sum man kanska ikki hevði væntað sær so nógv av. Man kann ikki gera við, at man ger sær eitt bilæt av menniskjum. Og har man ikki hevði væntað sær nakað, har finnur man gullið, tá man er saman við teimum, kanska til ein barnadóp, kanska til eina jarðarferð ella til brúdleyp. Fólk, sum

Framhald á síðu 26